# Toppnøvn í Sarajevo

**Føroyavinurin Ivan Sokolov hevur støðugt seinastu 10 árini ligið omanfyri 2600-ratingmarkinum og nærkast nú 2700. Hann telvar í løtuni saman við eitt nú Alexei Shirov í 33rd Bosnian Tournament**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Við somikið kendum nøvnum sum David Bronstein, Michail Tal, Viktor Korchnoi, Predrag Nikolic og Garry Kasparov, sum vinnarar av kappingini, er talan um eina sera søguríka og altíð vælmannaða kapping við heimsstjørnum. Í ár er einki undantak.

Absoluttu toppnøvnini í ár eru Shirov (2735 ratingstig) og Bareev (2734). Enn hevur 16 ára gamla undurbarnið Radjabov (2644) ikki førkað seg innum topp 10, men hann er væl á veg og kanska verður hendan kapping honum ein vegur fram til hetta mál. Í øllum førum vinnur hann sær rating í hvørjari kapping hann luttekur í. Einki og eingin tykist at steðga honum.

Sokolov, sum seinast var í Føroyum í 1997, hevði á næstseinasta lista heili 2688 í rating, men er síðani follin eitt petti niður á eitt eisini vælljóðandi tal, 2677. Í fjør bleiv hann næstir í røðini í hesu somu kapping, aftanfyri Movsesian úr Slovakia, sum somuleiðis luttekur í ár.

## Sokolov góða byrjan

Einans eitt umfar eru telvað í skrivandi løtu. Vinnarahugurin tykist avgjørt at vera til staðar, eftirsum at vinnari bleiv funnin í fýra av teimum fimm talvunum. Shirov, Sokolov, Radjabov og Movsesian vunnu allir. Ein av favorittunum, Bareev, mátti lúta fyri Movsesian. Sokolov vann á lægst rataða telvaranum, Dizdarevic (2491). Teir tíggju luttakararnir skulu allir telva ímóti hvørjum øðrum.

Talvið hesa vikuna er sigurin hjá Sokolov.

## Talvið hesa vikuna

GM Sokolov,I (2677) - GM Dizdarevic,E (2491)
Bosnia GM Sarajevo BIH (1), 18.05.2003

1.d4 d5 2.c4 c6 3.Nf3 Nf6 4.Ric3 dxc4 5.a4 Fa5 6.Bd2 Ff5 7.e3 Be6 8.Be2 (Tann tryggi hátturin var Rie5, sum gevur hvítum finnuna aftur) 8...Ribd7 9.0-0 h6 10.a5 Rc8 11.Fa4 Bd5 12.Rixd5 Rixd5? (cxd5 tykist sera natúrligt. Møguliga varð svartur bangin fyri Fb5 og tí heldur veiku b-finnuni) 13.Bxc4 g5 14.Rfe1 b5 15.axb6 Ri5xb6 16.Fa6 g4 17.e4 Fh5 18.Rie5 Rixe5 19.dxe5 Bg7 [19...Fxe5?? 20.Bc3] 20.e6! (Skræðir svørtu støðuna sundur, og kongurin verður nakin av tí sama 20...Be5 21.exf7+ Kf8 (Kongurin kann tykjast tryggur á f8, men tað heldur ikki í longdini 22.g3 Rd8 23.Rad1 Kg7 24.Ba2! (Idéin við leikinum kemur seinni...) 24...Bd4 25.Fe2 Fg6 26.Bf4 Kh7? (Als ikki tíð til slíkt. e5 var helst betri) 27.e5! Diagram

## Støðan eftir 27. e5

e6?? Hóast fyriuttan hendan vána leik, stendur svartur til tap. Hvítur hevur meirfinnu, bisparið og sum heild betri støðu 28.Bb1 og frúgvin er trælabundin. 1-0



Súkkling:

# Gunnar vann kappingina um Jútska/Fynska meistaraheitið



**Sunnudagin eydnaðist tað Gunnar Dahl-Olsen at gerast Jútsk/Fynskur meistari á 100 km súkkling.**

Nú tað styttist til Oyggjaleikir hevur føroyska súkklulandsliðið verið á venjingarlegu í Danmark. Á skránni hava verið bæði venjingar og kappingar.

Sunnudagin luttóku føroysku súkklararnir sum sagt í kappingini um Jútska/Fynska meistaraheitið. Kappingin fór fram í Svenborg á Fyn.

Veðrið var av tí fagrasta tá teir umleið 40 súkklararnir byrjaðu kl. 11 sunnumorgunin.

Teinurin var uml. 100 km og koyrast skuldi trý umfør á 33 km.

Komnir nakað út á annan umgang sluppu Gunnar og Bogi Kristiansen leysir frá høvuðsfeltinum. Teir sóu sær nú ein møguleika at sleppa avstað, og sostatt longu tíðliga í kappingini at avgera kappingina. Teir koyrdu nú alt teir vóru mentir, og skjótt høvdu teir eitt minutt aftur til høvuðsfeltið. Hendan munin megnaðu teir at halda líka á mál.

Tá góður kilometur var eftir á mál fór Gunnar frá Boga og megnaði at koyra sigurin heim, og vann sostatt kappingina við uml. 10 sek.

Gott ein minutt seinni kom høvuðsfeltið á mál.

Á føroyska landsliðnum eru umframt Boga og Gunnar, eisii Sverri Mohr Edvinsson og Eli Christiansen, ið á fyrsta sinni sleppur at royna seg í Oyggjaleikahøpi.

Jens Sigurð Simonsen er eisini úttikin til landsliðið, men hevur givið avboð vegna ein skaða í knænum. Venjarar á føroyska landsliðnum eru Geyr Gilsteinsson og Gunnar Dahl-Olsen. Høvuðsstuðul er Statoil Føroyar.

Soleiðis gjørdist úrslitið fyri nýggju teir fremstu:
H30 - 97,5 km.
1. Gunnar Dahl-Olsen (Thorshavn CC) 2.26,32.
2. Bogi Kristiansen (CC Gladsaxe) 2.26,41.
3. Henrik Dam Nielsen (Fyens Bicycle Club) 2.27,28.
4. Henning Sørensen (Hammel CK) s.t.
5. Jan Christoffersen (Fyens Bicycle Club) s.t.
6. Tommy Jacobsen (Vejen BC) s.t.
7. Torleif Røberg (Thorsager Motion Cykling) s.t.
8. Thorsten Schiller (Bov CC) 2.27,38.
9. Peter Claussen (Esbjerg CR) s.t.

## Sverri átta sekundir frá bronsuni

Leygardagin stóð einkultstartur á skránni hjá føroyska súkklulandsliðnum. Tá var kappast um Jútska/Fynska meistaraheitið í 30 km einkultstarti.

Sverri Mohr Edvinsson var væl koyrandi hendan dagin, men mátti taka til takkar við einum fjórða plássi, bert átta sekundir frá bronsuni.

- Eg gav alt eg kundi, men ergri meg um, at eg ikki hitaði betur upp undan kappingini, segði Sverri eftir kappingina.

## Statoil Kring Føroyar 2003

Tórshavnar Súkklufelag skipar aftur í ár fyri árligu Statoil Kring Føroyar etapukappingini.

Í døgunum frá 16. til 20. juli skipar TSF fyri afturvendandi súkklukappingini Statoil Kring Føroyar, og aftur í ár eru kappingin sett saman av fimm etapum.

Byrjað verður aftur í ár í Klaksvík, har ein sokallaður Prologur verður koyrdur. Ein prologur er ein stuttur einkultstartur, og endamálið er at lata sterkasta súkklaran í føraratroyggjuna.

Á næsta degi koyra súkklararnir á Eysturoynni, har málið verður við Statoilstøðina í Runavík. Á hesum teini mugu flest allir geva alt teir eiga og bíta tennirnar saman tá koyrast skal harða teinin um Eiðisskarð.

Triðja dagin fara súkklararnir til Sands. Ein 30 km einkultstartur stendur tá á skránni, og er Sandoyggin sera væl egnað til júst hetta slag av súkklukapping.

Leygardagin 19. juli verður koyrt á Suðuroynni, og sleppa súkklararnir aftur upp í hæddirnar, tá súkklast skal niðan á Hestin. Í ár verður málið við Statoilstøðina í Vági.

Finalan verður koyrd á Streymoynni, og har verður málið við Statoilstøðina í Gundadali.

Tórshavnar Súkklufelag vónar at undirtøkan verður góð í ár og tilmeldingarnar eru so smátt byrjaðar.

Í fjør vísti súkklarar frá Ynes Mon kappingini stóran áhuga, og í ár hava íslendingar longu nú melda fimm amnns til. SKF2003. Kappingin er fyri bæði ungdóm og seniorar og fyri kvinnur eisini.

Fyrireikingarnar eru farnar ígongd fyri langari tíð síðan, og tað mesta er um at verða komið uppá pláss, sigur formaðurin í Tórshavnar Súkklufelag, Gunnar Dahl-Olsen.

TSF hevur júst havt aðalfund, og umfram Gunnar sita Geyr Gilsteinsson, næstformaður, Sverri Mohr Edvinsson sum er kassameistari, Jens Sigurð Simonsen sum er skrivari og Eirikur Olsen.




## Yvirlýsing

Undirritaðu fakfeløg lýsa við hesum okkara fulla stuðul til Maskinmeistarafelagið og limir felagsins sum starvast hjá SEV, í sambandi við, at Karsten Hansen, landsstýrismaður hevur lagt seg út í sáttmálan, sum felagið hevur gjørt við SEV.

Samstundis átala vit, at landsstýrismaðurin brýtir rótfesta siðvenju um, at Landsstýrið ikki leggur seg út í sáttmálaviðurskiftini millum Maskinmeistarafelagið og SEV.

Serliga átaluverd er framferðin hjá landsstýrismanninum, tá vit kunnu staðfesta:
- at Karsten Hansen longu áðrenn 1. apríl fekk kunnleika til, at sáttmálin millum Maskinmeistarafelagið og SEV var skrivaður undir,
- at Karsten Hansen ikki gjørdi vart við seg fyrr enn 7. mai, tá undirritaðu feløg vóru byrjaði semingingsroyndir okkara.

Skilligt er, at endamálið hjá landsstýrismanninum er at royna at seta undirritaðu feløgum trongar karmar fyri møguleikanum at samráða okkum fram til eina nøktandi lønarhækking fyri limir okkara.

Vit átala, at landsstýrismaðurin soleiðis tekur Maskinmeistarafelagið og teir limir felagsins, sum staravast hjá SEV, sum gíslar, í sambandi við uppílegging hansara í sáttmálasamráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum.

**Tórshavn, 15.05.2003**

Føroya Arbeiðarafelag • Havnar Arbeiðsmannafelag • Havnar Arbeiðskvinnufelag

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag



## Búmerkjakapping

Í sambandi við at Felagið Vágar av álvara er farið undir virki sítt, verður hervið útskrivað ein búmerkjakapping.

Endamál við hesi kapping er at felagið kann fáa eitt búmerki, ið kann nýtast til ymiskt virksemi hjá felagnum. Somuleiðis er ætlanin at limir felagsins, eitt nú handlarnir, kunnu nýta búmerkið til at gera vart við, at tey eru við í felagnum.

Búmerkið skal helst verða einfalt og eygagott.
Hevur tú hugflog, listarlig evni og ikki minst hug, so send okkum endiliga títt hugskot innan 15. Juni 2003.

Vinnarin av kappingini fær ein APEX-ferðaseðil fyri 2 til Danmarkar við Atlantsflog

Nummar tvey fær eitt vikuskifti fyri tvey á Hotel Vágum við gisting, morgunmati og døgurða.

Felagið Vágar er eitt nýtt felag, ið er sett saman av tí fyrrverandi Vága Vinnufelag, ferðavinnuni í Vágum og handlunum í Vágum. Endamál felagsins er millum annað at menna bæði ferðavinnu, handilsvinnu og aðra vinnu í oynni, umframt at samskipa handils-, vinnu- og mentanarlív í Vágum.

Í dómsnevndini fyri búmerkjakappingina sita: Per Hansen, Ferðaráð Føroya, Bogi Henriksen, teknari á lýsingarfyritøkuni Sansir, Petur Slyne, stjóri á lýsingarfyritøkuni Petur & Petur, Janita Hansen, nevndarlimur í Felagnum Vágar og Terji Nielsen, dagligur leiðari hjá Felagnum Vágar.



Uppskot skulu sendast til
**Felagið Vágar**
**370 Miðvágur**
**innan 15. Juni 2003**



Toll- og Skattstova Føroya Vága øki

## Avloysarastarv á Toll- og Skattstovu Føroya, Vága Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya ,Vága Øki er avloysarastarv svarandi til fulla starvstíð leyst at søkja fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi frá 16/6 2003 - 15/4-2004.

**Arbeiðsuppgávur**
Talan er um fjølbroytt arbeiði, ið umfatar bæði eftirlitsarbeiði og avgreiðslu og eru uppgávurnar m.a. hesar:

- persónlíkning, fyribilslíkning, stuðulsskipaninar, journal, dupultskattamál, eftirlønir/rentutrygging.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving e.l., vera arbeiðssamur, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiði til rættis. Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við teldu-arbeiði - kunnleika til EDV er ein treyt - og skal vera førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðinum. Tað er ein fyrimunur við arbeiðsroyndum innan skattalóggávuna.

**Setunarviðurskifti**
Løn og setunarviðurskifti verða ásett eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og møgulig viðmæli skulu sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Vága øki **innan 28 mai 2003**.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at venda sær til Elsu Brimvík, økisstjóra á tlf. 357700.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Vága Øki
380 Sørvágur

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hja landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Vága Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 11 starvsfólk.


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3559
**Navn:** Sp/f Fragd
**Adressa:** Undir Hálsi 18, 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 30.04.2003
**Viðtøkudato:** 30.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Páll Samuelsen, Stangavegur 74, 700 Klaksvík og Jákup Pauli Joensen, Undir Hálsi 18, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Jákup Pauli Joensen, Undir Hálsi 18, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðan Jóannis Skorheim, Klaksvíksvegur 28, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 30.04.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka tænastuvinnu, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 14. mai 2003*

*Kristin Balle*


## Miðnámsskúlin í Suðuroy

Frá 1. august 2003 er eitt starv í **Evnafrøði** leyst at søkja.

Harumframt eru, somuleiðis frá 1. august 2003, hesir tímar leysir at søkja:

| | |
|---|---|
| Ítróttur | 4,5 tímar |
| Alis/Evnafrøði | 4,5 tímar |
| Lívfrøði miðstig | 5,5 tímar |
| Geografi | 3,5 tímar |
| Tónleikur | 8,0 tímar |
| Sálarlæra | 4,0 tímar |
| Leiklist | 4,5 tímar |
| Latín | 3,0 tímar |

Setan fer fram sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Yrkisfelag Studenta- og HF lærara (YF).

Umsóknin á oyðublað frá YF verður stílað til Mentamálaráðið, men verður send til

**Miðnámsskúlan í Suðuroy**
Postboks 130
FO-900 Vágur
att. Ole V. Laursen, deildarleiðari
Tlf. 373622, fax 374026, e-mail ole@midnam.fo

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 3. juni 2003.